# Minni kokain at fáa

Sambært bretska felagsskapinum Serious Organised Crime Agency eru altjóða tiltøkini ímóti rúsevnahandli og -smugling farin at gera mun. BBC sigur frá felagsskapinum, at minni kokain er á marknaðinum, og tað hevur havt við sær, at heilsøluprísurin á evninum er hækkaður nógv, men at prísurin á gøtuni kortini er á leið tann sami sum undanfarin ár. Bretski felagsskapurin sigur, at eitt kilo av kokaini kostar umleið 45.000 sterlingpund í heilsølu í Bretlandi í dag. Tað er munandi meiri enn fyri bara fáum árum síðani og kemst av, at minni kokain kemur til Bretlands. Sum skilst er tað eisini vorðið truplari at fáa fatur á kokaini aðrastaðni í Evropa.



# Var ikki í Hitler-Jugend

Vatikanið í Rom avsannaði í gjár, at Benedikt pávi 16. var limur í nazistisku ungdómsdeildini Hitler Jugend, tá hann var ungur. Talsmaðurin hjá Vatikaninum, Frederico Lombardi, segði, at sum 16 ára gamal var pávin við í einari loftverjudeild, men hon hevði einki við nazistarnar ella nakrar nazistiskar hugsjónir at gera. Upplýsingin samsvarar ikki við tað, sum Benedikt pávi sjálvur hevur sagt fyrr, tí hann hevur fleiri verið sagt, at hann var limur í Hitler Jugend, tá hann var ungur, men at hann bleiv tvungin uppí. Hesi viðurskiftini umrøður pávin eisini í bókini "Salt jarðarinnar".






*Brynhild Thomsen í sofapráti við Honnu Vibeke Holst*

- Tær ungu kvinnurnar halda, at kynini eru líkastillað. Men tað eru vit als ikki, staðfestir Hanne Vibeke Holst. Tí, sum hon sigur: ein maður, sum bjóðar seg fram at valdinum, ger bara tað, sum hevur verið væntað av honum líka frá barnsbeini. Meðan ein kvinna, sum bjóðar seg fram, gongur ímóti tí, sum samfelagið vanliga krevur av einari kvinnu. Tí hon skal jú allarhelst vera fitt og arbeiða niðursetta tíð og vilja frið og semjur – og ikki grótharðan maktkamp, har knívarnir flúgva gjøgnum luftina og av og á lenda millum rivjabeinini í rygginum.

Á tiltakinum í gjárkvøldið kom Hanne Vibeke Holst við fleiri dømum um, at tær, sum stinga nøsina fram í politikki, nokk skulu blíva kanøflaðar, um tær ikki eru á varðhaldi og hava eitt feministiskt medvit. Til dømis við eyknevnum sum Gucci-Helle og almennum viðmerkingum um útsjónd, vekt, kropp og mammuleiklutin. Og maðurin, sum situr púra einsamallur heima og "fær ikki nokk", og vermamman, sum tekur synd í soninum, tí hann hevur eina vánaliga konu.

- Tú noyðist at hugsa feministiskt, tá tú bjóðar tey fram. Tí har eru fleiri, sum vilja teg til lívs. Bæði mannligir politikarar, sum absolutt ikki halda tað vera stuttligt, at lata valdið frá sær, men so sanniliga eisini vanlig fólk, sum bara ikki tola, at kvinnur ganga egnar leiðir og seta sær politisk mál, segði Hanne Vibeke Holst.

**Medborgaraskapur**
*Medborgaraskapur er kenslan av at hoyra til ein størri felagsskap, at hava sosiala ábyrgd og rættindi og skyldur innan fyri felagsskapin. Medborgaraskapur snýr seg serliga um, at luttaka í menningini av felagsskapinum.*

## Gakk eftir maktini

Ritt Bjerregaard, yvirborgmeistari í Keypmannahavn og fyrrverandi lands- og europapolitikari, er ein av fremstu fyrimyndunum hjá Honnu Vibeke Holst. Bæði persónliga og í bókum hennara.

Ein av lærusetningunum hjá Ritt Bjerregaard er, at um tú veruliga vilt, so mást tú vera til reiðar at fara eftir teimum høgu sessunum í politikki.

Men Hanne Vibeke Holst er eisini greið um, at tað eru nógvar forðingar/umberingar fyri ikki at taka lut. Ítøkiliga nevnir hon uppreklameraða móðurleiklutin, ójavnstøðuna í mun til barnsburðarfarloyvi og hetta við, at kvinnur eru so ljótar við hvørja aðra. Tí mælir hon til, at vit skulu stuðla teimum, sum bjóða seg fram. Eisini um vit eru politiskt ósamdar. Við at netverka og fylkast, so vit sleppa burtur úr demokratiska undirskotinum. Tí prísurin fyri at verða kúgað, er nógv hægri, enn prísurin fyri at taka maktina.

- Vit eru komin so langt í dag. Børnini kunnu verða ansað og kvinnur hava fakligu førleikarnar. Nú mangla tær bara at bjóða seg fram, droppa perfektheitsgenið og minnast, at ongin kemur smílandi til valdið.